# Innihaldsyvirlit / Indholdsfortegnelse


| | |
|---|---|
| Leiðslufrágreiðing | 2 |
| *Ledelsesberetning for 2004* | *4* |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| *Anvendt regnskabspraksis* | *7* |
| Gongdin seinastu 5 árini | 9 |
| *Udviklingin over 5 år* | |
| Rakstrarúrslit | 10 |
| *Resultatopgørelse* | |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember | 11 |
| *Balance pr. 31. december* | |
| Viðmerkingar til ársroknskapin | 12 |
| *Noter til årsregnskab* | |
| Átekningar | 15 |
| *Påtegninger* | |
| Grannskoðararátekningar | 16 |
| *Revisionspåtegninger* | |



P/F TRYGD
Gongin 7
Postboks 44
FO 110 Tórshavn
Tlf. +298 35 81 00
Fax +298 31 72 11
E-mail: trygd@trygd.fo
www.trygd.fo
Pf.skr.nr.8, Tórshavn
V-tal nr. 324.086

Leiðslufrágreiðingin fyri 2005

**Marknaðurin**
Í 2005 hevur tann føroyski marknaðurin av skaðatryggingum ment seg á fleiri økjum. Lutvíst hevur marknaðurin verið ávirkaður av innlendis viðurskiftum, so sum harðari kapping og einum rímiligum vøkstri og lutvíst av framtíðarútlitum uttaneftir, sum fylgja av Íslandssáttmálanum um frían flutning av kapitali, vørum og tænastum millum londini. Hetta fer at hava við sær lógarbroytingar, m.a. innan tryggingarøkið bæði í Føroyum og Íslandi. Tað merkir eina liberalisering av teimum núverandi rammum fyri at útinna tryggingarvirksemi í Føroyum, tí at útlendskir aktørar eisini fara at kunna virka í Føroyum. Serliga innan sjóvátrygging hevur verið hørð kapping, og hetta hevur havt við sær eina størri niðurgongd í tryggingargjøldunum, sum longu frammanundan ikki hava kastað nógv av sær á øllum marknaðinum.

Ein stórur partur av tí almenna marknaðinum varð í 2005 skerdur orsakað av, at tað almenna hevur valt at hava størri sjálvváða, m.a. grundað á skaðagongdina. Hetta kann tó vísa seg at verða ein sera trong- og stuttskygd loysn, og kann væntast, at reinur sjálvváði kann raka tað almenna ótilætlað, tá skaðar henda.

Í 2005 byrjaði TRYGD fyri fyrstu ferð at tekna arbeiðsskaðatryggingar, og eydnaðist tað at seta í verk eitt sunt handilsgrundarlag í hesi vinnugrein.

Árið 2005 hevur gjøgnumgangandi verið merkt av eini skaðagongd við fleiri stórum skaðum innan sjóvá-, vinnu- og privattryggingar.

**Tryggingarinntøkur**
TRYGD hevur eisini í 2005 staðfest ein framhaldandi vøkstur í goymslunøgdini av tryggingum, tryggingargjøldini eru soleiðis økt úr 56,8 mió. kr. í 66,4 mió. kr., sum svarar til eina øking á 17%.

Hesin vøkstur kann partvís grundast á ein áhaldandi vøkstur í tryggingartørvinum, eins og felagið hevur økt sín marknaðarpart innan flestu tryggingargreinar. Hetta er tó ikki galdandi innan sjóvátryggingar, har marknaðarparturin hjá TRYGD helst er minkaður. Hetta er ein beinleiðis avleiðing av príspolitikkinum hjá TRYGD, sum ikki hevur tikið lut í eini enn størri lækking av tryggingargjøldunum, sum í teimum undanfarnu árunum hevur havt tap við sær.

**Skaðagongdin**
Í 2005 hevur skaðagongdin verið ávirkað av fleiri sethúsaeldum, sum hava ført við sær høgar endurgjaldsútreiðslur. Somuleiðis hava nógvir vatnskaðar verið viðvirkandi til eitt ónøktandi úrslit innan privattryggingar. Gongdin í skaðaútreiðslunum innan biltryggingarøkið hevur framhaldandi verið neilig í 2005, men her vórðu tiltøk sett í verk í árinum fyri at betra um úrslitið. Úrslitið innan biltryggingarøkið fyri alt árið 2005 er harvið enn ikki nøktandi.

Úrslitið av goymslunøgd felagsins av sjóvátryggingum hevur havt eina neiliga gongd í 2005 grundað á fleiri og størri skaðar. Innan aðrar tryggingargreinar hevur gongdin verið nøktandi.

Tær samlaðu skaðaútreiðslurnar fyri egna rokning í 2005 vóru uml. 36 mió. kr. ímóti uml. 29 mió. kr. árið fyri.

**Endurtrygging**
Endurtryggingarskipanin hjá TRYGD fyri 2005 broyttist ikki stórvegis, og grundarlagið var, at TRYGD skuldi rinda fyri vanligar skaðar fyri egna rokning. Harafturímóti skuldu størri váði og skaðar framhaldandi verða endurtryggjaðir. Smærri tillagingar av skipanini høvdu tó við sær, at tryggingarinntøkurnar hjá TRYGD og skaðaútreiðslurnar fyri egna rokning av hesi orsøk hækkaðu eitt sindur í 2005.

**Tryggingartekniskt úrslit**
TRYGD hevði í 2005 eitt tryggingartekniskt úrslit á umleið -1,1. mió. kr., sum stendst av eini vánaligari skaðagongd, samantvinnað við øktum fyrisitingarútreiðslum. Úrslitið má sigast at vera lutvíst væntað, men tó ikki nøktandi. Ein av orsøkunum til ársúrslitið er at finna í vantandi umsetninginum til at rinda størri einstakar skaðar.

**Gongdin í felagnum**
Í sambandi við stjóraskifti setti TRYGD út nýggja kós og nýggjan málsetning fyri víðari menning av felagnum. Felagið hevur lagt áherðslu á sølu og at fáa vøkstur í goymslunøgd felagsins av tryggingum. Hetta hevur m.a. havt við sær, munandi økt virksemi við tí í hyggju at betra um raksturin av felagnum, tænasturnar, útboðið av tryggingum og útbreiðslumegina til gagns fyri okkara kundar. Felagið hevur framt stórar bygnaðarbroytingar við nýggjum virksemi, nýggjum leiðsluleisti og hevur sett nýggj starvsfólk. Felagið hevur sjósett eina nýggja virkismentan og nýggj virði við áherðslu á úrslit og samstarv.

Við árslok 2005 vóru 22 fólk í fulltíðarstarvi í felagnum, í mun til 14 í 2004. Her skal leggjast afturat eitt ávíst tal av ráðgevum í fríari vinnu, sum hava verið knýttir at felagnum í 2005.

**Ársúrslit**
TRYGD hevði í 2005 eitt avlop á 2,2 mió. kr. áðrenn skatt.

Grundað á ta neiligu skaðagongdina og tann høga, men tó væntaða kostnaðin í sambandi við tær umfatandi bygnaðarbroytingarnar er leiðslan av teirri áskoðan, at úrslitið ikki er nøktandi.

Skatturin er 0,45 mió. kr., og nettoavlopið eftir skatt í 2005 gjørdist sostatt eitt yvirskot á 1,7 mió. kr.

**Ársavlop**
Nevndin skjýtur upp, at ársavlopið verður flutt til næsta ár.

**Eginogn felagsins**
Við árslok 2005 var eginognin hjá TRYGD 121,7 mió. kr. Partapeningurin, sum er 40 mió. kr., eigur P/F Føroya Banki allan.

**Útlit fyri 2006**
Leiðslan væntar eina øking í tryggingargjøldunum. Hetta er lutvíst grundað á ein veruligan vøkstur í tryggingargjøldunum, bæði fyri bil- og sjóvátryggingar, og eisini innan nýggjar tryggingargreinar sum privatvanlukkutrygging. Tann framhaldandi neiliga gongdin á núverandi vinnugreinum má vendast. Harafturat væntast øking í tryggingargjøldunum grundað á øktan marknaðarpart.

Ein liberalisering av tryggingarmarknaðinum fer ivaleyst at elva til nýggjan dynamikk, sum kann koma vinnugreinunum og kundum teirra til góðar. Felagið væntar at fáa javnvág í tað tekniska úrslitið sum eina beinleiðis avleiðing av teimum tiltøkum, sum eru framd.

## Markedet
Det færøske marked for skadesforsikring har i løbet af 2005 udviklet sig på flere fronter. Dels blev markedet præget af indre faktorer såsom hård konkurrence og moderat vækst og dels kom der nye eksterne perspektiver i form af den indgåede færøsk-islandske aftale om fri bevægelighed af kapital, varer og services mellem landene. Sidstnævnte vil afstedkomme lovændringer bl.a. indenfor forsikringsområdet såvel på Færøerne som på Island. Dette vil medføre en liberalisering af de eksisterende rammer for udøvelse af forsikringsvirksomhed på Færøerne, derved at udenlandske aktører vil kunne operere på Færøerne. Konkurrencen på især søforsikringer var intensiv og dette betød en yderligere reduktion af præmieniveauet, som i forvejen havde nået et urentabelt niveau i hele markedet.

En stor del af det offentlige marked er i 2005 blevet reduceret i og med at man har ønsket en større grad af selvforsikring, bl.a. begrundet i skadesforløb. Dette kan dog vise sig at være et for snævert og kortsigtet perspektiv, og det må forventes at ren selvforsikring vil kunne ramme det offentlige utilsigtet når skader opstår.

TRYGD påbegyndte i 2005 at tegne arbejdsskadeforsikring for første gang og lykkedes det at få etableret et sundt forretningsgrundlag på dette område. Generelt har 2005 været præget af et skadesforløb med en del større enkeltstående skader indenfor søforsikring, erhverv og privathus.

## Præmieindtægter
I 2005 kunne TRYGD mønstre en fortsat vækst i forsikringsporteføljen. Bruttopræmien er steget fra 56,8 mio. kr. 66,4 mio. kr. svarende til en stigning på 17 %.

Væksten kan dels begrundes i en fortsat vækst i forsikringsbehovet, ligesom selskabet har vundet en større markedsandel indenfor de fleste brancher. Det gælder dog ikke søforsikring, hvor TRYGD formentlig har reduceret sin markedsandel. Dette som en direkte konsekvens af TRYGD´s prispolitik, idet TRYGD ikke deltog i en yderligere sænkning af præmieniveauet, der i de forløbne år har været tabsgivende.

## Skadeforløbet
I 2005 har skadesforløbet været præget af flere privathus-brande, hvilket har betydet høje skadeserstatningsudgifter. Ligeledes har et stort antal vandskader været medvirkende til et utilfredsstillende resultat i privatbrancherne. Inden for bilforsikringsområdet fortsatte den negative udvikling i skadeudgifterne ind i 2005, men tiltag blev i årets løb sat i værk for at rette op på resultatet. Resultatet på bilområdet for hele året 2005 er således endnu ikke tilfredsstillende. Resultatet for TRYGD's portefølje af søforsikringer har haft et negativt forløb i 2005 fordelt på flere og større skader. TRYGD´s øvrige portefølje er forløbet tilfredsstillende.

De samlede skadesudgifter for egen regning i 2005 var ca. 36 mio. kr. mod ca. 29 mio.kr. året før.

## Reassurance
TRYGD´s reassuranceprogram for 2005 ændredes ikke væsentligt og grundlaget var, at TRYGD skulle dække almindeligt forekommende skader for egen regning, hvorimod større risici og skader fortsat skulle være reassureret. Mindre tilpasninger af programmet betød dog, at TRYGD's præmieindtægter og skadeudgifter for egen regning af denne årsag steg lidt i 2005.

## Forsikringsteknisk resultat
TRYGD fik i 2005 et forsikringsteknisk resultat på ca. -1,1 mio. kr., hvilket skyldtes et dårligt skadesforløb kombineret med øgede administrationsomkostninger. Resultatet må betragtes som delvis forventet, men dog ikke tilfredsstillende. En af årsagerne til årets resultat skal findes i selskabets manglende kritiske masse til inddækning af opståede større enkeltskader.

## Selskabets udvikling
TRYGD udstak i forbindelse med direktørskifte en ny kurs og målsætning for selskabets videre udvikling. Selskabets fokus er således lagt på salg og vækst i porteføljen.

Dette har bl.a. betydet en væsentlig forøget aktivitet med henblik på forbedringer af selskabets drift, services, produkter og distributionskraft til gavn for vore kunder. Selskabet har således gennemlevet en væsentlig organisationsforandring med indførelse af nye funktioner, en ny lederstruktur og nye medarbejdere. Selskabet har søsat en ny kultur og værdisæt, med fokus på resultater og samarbejde.

Ved udgangen af 2005 var der 22 fuldtidsansatte medarbejdere i selskabet, mod 14 i 2004.

Hertil skal lægges et antal free-lance konsulenter som har været tilknyttet selskabet i 2005.





## Årets resultat
TRYGD havde i 2005 et overskud på 2,2 mio. kr. før skat.

Med baggrund i det negative skadesforløb og de, trods forventede, høje omkostninger i forbindelse med den omfattende omorganisering, anser ledelsen resultatet for ikke tilfredsstillende.

Skatten andrager 0,45 mio. kr., og nettoresultatet efter skat i 2005 udviser herefter et overskud på 1,7 mio. kr.

## Overskudsdisponering
Bestyrelsen foreslår, at årets overskud overføres til næste år.

## Selskabets kapitalforhold
Ved udgangen af 2005 androg TRYGD's egenkapital 121,7 mio. kr. Aktiekapitalen, der andrager 40 mio. kr., ejes i sin helhed af P/F Føroya Banki.

## Forventninger til 2006
Ledelsen forventer at selskabet vil se en øget præmieudvikling delvis baseret på realvækst i præmieniveauer indenfor såvel bil som søforsikring samt nye produkter såsom privat ulykkesforsikring, idet en fortsat negativ udvikling på eksisterende brancher må undgås, samt delvis baseret på øget markedsandele.

En liberalisering af forsikringsmarkedet vil givetvis bibringe dette ny dynamik, hvilket kan komme såvel branchen som dens kunder til gode. Selskabet forventer at få balance i det tekniske resultat som direkte afledt af de iværksatte initiativer.

**Alment**
Ársroknskapurin hjá TRYGD er gjørdur í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi og í samsvari við alment góðkendar roknskaparreglur.
Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

**Tryggingargjøld**
Tryggingargjøld verða tíðaravmarkað, soleiðis at inntøkur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

**Latin endurtryggingargjøld**
Tryggingargjøld til endurtryggingarfeløg verða tíðaravmarkað, soleiðis at útreiðslur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

**Endurgjøld/endurgjaldsburturleggingar**
Endurgjaldsburturleggingar og áogn av skaðum, eru uppgjørd eftir einsæris metingum av hvørjum skaða sær, sum ikki er endaliga uppgjørdur. Íroknað endurgjaldsburturleggingarnar, er eisini ein eykaupphædd á 5%, fyri hendar men ikki fráboðaðar skaðar, og eitt eyka fríhald á 10% til óvæntaðar skaðaútreiðslur.

**Tryggingarteknisk renta**
Tryggingartekniska rentan er roknað sum 2,42% av miðalstøddini á tryggingarburturleggingum fyri egna rokning.

**Endurtryggingarfulnaður**
Gjøld frá endurtryggjaranum viðvíkjandi meldaðum skaðum verða tíðaravmarkað, soleiðis at hesi verða tikin við í tann mun, tey eru tengd at roknskaparárinum.

**Fastar ognir**
P/F TRYGD eigur eini tvíhús, hvørs virði er ásett til marknaðarvirði.

**Lánsbrøv**
Lánsbrævagoymsla felagsins er virðissett sambært almennum kursum við árslok.

**Innbúgv og rakstrartól**
Innbúgv og rakstrartól felagsins eru bókað til keypsprís, frádrigið av- og niðurskrivingar. Ognirnar verða avskrivaðar liniert, grundað á ætlaða nýtslutíð eftir 3 til 5 ár.
Útveganir av rakstrargøgnum fyri undir 20 tkr. verða útreiðsluførdar.
Ritbúnaður (software) verður útreiðsluførdur í útveganarárinum.

**Skattur**
Skattur er samansettur av skatti av skattskyldugu inntøkuni fyri árið og javning av útsettum skatti. Skatturin av skattskyldugu inntøkuni í árinum verður útreiðsluførdur í rakstrarúrslitinum við 20%.
Útsetti skatturin verður avsettur við 20% av muninum millum roknskaparlig og skattlig virði á ogn og skuld.

**Handlar innan samtakið**
Við handli millum feløg í samtakinum og millum samstarvsfyritøkur, eins og tá hesi gera arbeiði hvørt fyri annað, verða avroknað sambært marknaðartreytum ella á einum útreiðslunøktandi grundarlagi.



**Generelt**
Årsregnskabet er udarbejdet i overensstemmelse med lov om forsikringsvirksomhed, samt almindelig anerkendt regnskabspraksis.
Anvendt regnskabspraksis er uændret i forhold til sidste år.

**Præmier/præmiehensættelser**
Præmieindtægten periodiseres, således at indtægten svarer til regnskabsårets andel.

**Afgivne genforsikringspræmier**
Præmier til ressurandører periodiseres, således at udgiften svarer til regnskabsårets andel.

**Erstatninger/erstatningshensættelser**
Erstatningshensættelser og tilgodehavender vedrørende skader opgøres efter en individuel vurdering af hver uafsluttet skade. I erstatningshensættelserne indgår endvidere en reserve på 5% til indtrufne men ikke anmeldte skader og en ekstra stødpudereserve på 10% til uforudsete skadeudgifter.

**Forsikringsteknisk rente**
Den forsikringstekniske rente beregnes som 2,42% af de gennemsnitlige forsikringsmæssige hensættelser for egen regning.

**Genforsikringsdækning**
Reassurandørens andel af anmeldte skader periodiseres, således at indtægten svarer til regnskabsårets andel.

**Bygninger**
TRYGD ejer 1 sammenbygget rækkehus, hvis værdi er ansat til markedsværdi.

**Værdipapirer**
Selskabets obligationsbeholdning er optaget til den senest noterede officielle kurs.

**Inventar, edb anlæg, bil m.v.**
Inventar, edb anlæg og selskabets biler er opført til anskaffelsessum, reguleret for af- og nedskrivninger. Der foretages liniære afskrivninger baseret på aktivernes forventede driftsøkonomiske levetid på mellem 3 og 5 år.
Anskaffelse af driftsmateriel under 20 tkr. udgiftsføres.
Software udgiftsføres i anskaffelsesåret.

**Skat**
Årets skatteudgift omfatter skat af årets skattepligtige indkomst samt regulering af udskudt skat.
Skat af årets skattepligtige indkomst udgiftsføres i resultatopgørelsen med 20%.
Udskudt skat hensættes efter den balanceorienterede gældsmetode med 20% af midlertidige forskelle mellem regnskabs- og skattemæssige værdier af aktiver og passiver.

**Koncerninterne transaktioner**
Transaktioner mellem koncernens selskaber og associerede virksomheder afregnes på markedsbaserede vilkår eller på omkostningsdækkende basis.

# TRYGD

| DKK 1.000<br>**Høvuðstøl** / *Hovedtal* | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld f.e.r / *Præmieindtægter f.e.r.* | 9.774 | 13.982 | 34.508 | 41.576 | 49.720 |
| Skaðagjøld f.e.r / *Erstatningsudgifter f.e.r.* | -9.560 | -8.853 | -26.254 | -28.601 | -35.823 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r. / *Forsikringsmæssige driftsomkostninger f.e.r.* | -4.956 | -6.187 | -9.475 | -12.127 | -15.813 |
| Tryggingartekniskt úrslit / *Forsikringsteknisk resultat* | -4.428 | -665 | -652 | 1.449 | -1.145 |
| Úrslit av íløguvirksemi /*Resultat af invest. virksomhed* | 5.598 | 4.468 | 3.013 | 3.158 | 3.306 |
| Ársúrslit / *Årets resultat* | 1.033 | 3.059 | 1.889 | 3.694 | 1.720 |
| Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r. | 9.456 | 14.470 | 21.811 | 24.847 | 36.858 |
| Eginpeningur / *Egenkapital* | 111.356 | 114.416 | 116.305 | 119.999 | 121.719 |
| Ognir tilsamans / *Aktiver i alt* | 127.151 | 132.552 | 148.266 | 157.017 | 173.551 |

| Nota | DKK 1.000 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|
| | Tryggingargjøld, brutto / *Bruttopræmier* | 66.406 | 56.827 |
| | Latin endurtryggingargjøld / *Afgivne genforsikringspræmier* | -14.909 | -13.219 |
| | Broyting í avsetingum til tryggingargjøld / *Ændring i bruttopræmiehensættelser* | -1.818 | -1.831 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til tryggingargjøld / *Ændring i genforsikringsandel af præmiehensættelser* | 41 | -201 |
| | **Tryggingargjøld f.e.r. / *Præmieindtægter f.e.r.*** | **49.720** | **41.576** |
| 1 | **Tryggingarteknisk renta f.e.r. / *Forsikringsteknisk rente f.e.r.*** | **771** | **601** |
| | Útgoldin skaðagjøld, brutto / *Udbetalte bruttoerstatninger* | -29.110 | -36.834 |
| | Endurgoldið frá endurtryggingingini / *Modtaget genforsikringsdækning* | 3.521 | 9.237 |
| | Broyting í avsetingum til skaðagjøld / *Ændring i bruttoerstatningshensættelser* | -10.493 | 1.525 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / *Ændring i genforsikringsandel af erstatningshensættelser* | 259 | -2.529 |
| | **Skaðagjøld f.e.r. / *Erstatningsudgifter f.e.r.*** | **-35.823** | **-28.601** |
| 2, 6, 7 | Fyrisitingarútreiðslur / *Administrationsomkostninger* | -15.562 | -12.004 |
| | Tekningarútreiðslur / *Erhvervelsesomkostninger* | -744 | -562 |
| | Provisiónir frá endurtryggingum / *Provisioner fra genforsikringsselskaber* | 493 | 439 |
| | **Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / *Forsikringsmæssige driftsomkostninger f.e.r.*** | **-15.813** | **-12.127** |
| | **Tryggingarteknisk úrslit / *Forsikringsteknisk resultat*** | **-1.145** | **1.449** |
| | Inntøkur av fastari ogn / *Indtægter af fast ejendom* | -16 | 35 |
| 3 | Rentur og vinningsbýti v.m. / *Renter og udbytter m.v.* | 4.137 | 3.893 |
| 4 | Virðisjavnan av íløguognum / *Kursreguleringer af investeringsaktiver* | -44 | -169 |
| | **Inntøkur av íløguognum / *Indtægter af investeringsaktiver*** | **4.077** | **3.759** |
| | **Flutt til tryggingartekniska rentu / *Overført til forsikringsteknisk rente*** | **-771** | **-601** |
| | **Úrslit av íløguvirksemi / *Resultat af investeringsvirksomhed*** | **3.306** | **3.158** |
| | **Úrslit undan skatti / *Ordinært resultat før skat*** | **2.161** | **4.607** |
| 5 | **Skattir / *Skatter*** | **-441** | **-913** |
| | **Ársúrslit / *Årets resultat*** | **1.720** | **3.694** |



| Nota | DKK 1.000 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|
| | **Ogn / *Aktiver*** | | |
| 8 | Fastar ognir / *Faste ejendomme* | 980 | 1.960 |
| 10 | Lánsbrøv / *Obligationer* | 36.478 | 37.353 |
| | **Íløguognir / *Investeringsaktiver*** | **37.458** | **39.313** |
| 11 | Áogn hjá tryggingartakarum / *Tilgodehavende hos forsikringstagere* | 9.472 | 7.902 |
| 12 | Áogn hjá tryggingarfeløgum / *Tilgodehavende hos forsikringsselskaber* | 63 | 0 |
| 13 | Onnur áogn / *Andre tilgodehavender* | 49 | 51 |
| | **Áogn / *Tilgodehavende*** | **9.584** | **7.953** |
| 9 | Edv, innbúgv, bilar o.a. / *Edb, inventar, biler m.v.* | 353 | 333 |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn / Kassebeholdning og anfordringstilgodehavender | 124.256 | 108.036 |
| | **Aðrar ognir / *Andre aktiver*** | **124.609** | **108.369** |
| | **Tíðaravmarkingar / *Periodeafgrænsningsposter*** | **1.900** | **1.382** |
| | **Ognir tilsamans / *Aktiver i alt*** | **173.551** | **157.017** |
| | **Skuld / *Passiver*** | | |
| | Partapeningur / *Aktiekapital* | 40.000 | 40.000 |
| | Yvirkursgrunnur / *Overkursfond* | 44.975 | 44.975 |
| | Framflutt úrslit / *Overført resultat* | 36.744 | 35.024 |
| 14 | **Eginpeningur / *Egenkapital*** | **121.719** | **119.999** |
| | Avsett til tryggingargjøld, brutto / *Bruttopræmiehensættelser* | 14.516 | 12.698 |
| | Partur hjá endurtryggingini / *Genforsikringsandel* | -228 | -187 |
| 15 | **Avsett til tryggingargjøld f.e.r. / *Præmiehensættelser f.e.r.*** | **14.288** | **12.511** |
| | Avsett til skaðagjøld, brutto / *Erstatningshensættelser, brutto* | 24.935 | 14.441 |
| | Partur hjá endurtryggingini / *Genforsikringsandel* | -2.365 | -2.105 |
| | **Avsett til skaðagjøld f.e.r. / *Erstatningshensættelser f.e.r.*** | **22.570** | **12.336** |
| 16 | Skuld í samband við endurtrygging / *Gæld i forbindelse med genforsikring* | 2.267 | 879 |
| | Partafelagsskattur / *Selskabsskat* | 439 | 904 |
| | Onnur skuld / *Anden gæld* | 3.169 | 2.587 |
| | **Skuld / *Gæld*** | **5.875** | **4.370** |
| 17 | **Tíðaravmarkingar / *Periodeafgrænsningsposter*** | **9.099** | **7.801** |
| | **Skuld tilsamans / *Passiver i alt*** | **173.551** | **157.017** |

| | DKK 1.000 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Tryggingarteknisk renta** / ***Forsikringsteknisk rente*** | | |
| | Tryggingarteknisk renta er roknað sum 2,42% av miðal burturleggingum fyri tryggingarvirksemi f.e.r. / *Forsikringsteknisk rente er beregnet som 2,42 % af de gennemsnitlige forsikringsmæssige hensættelser f.e.r.* | | |
| 2 | **Fyrisitingarútreiðslur** / ***Administrationsomkostninger*** | | |
| | Í upphæddini eru íroknaðar hesar avskrivingar / *I beløbet indgår følgende afskrivninger:* | | |
| | Maskinur og innbúgv / *Maskiner og inventar* | 90 | 162 |
| | Bilar / *Biler* | 91 | 50 |
| | Fastogn / *Fast ejendom* | 0 | 0 |
| | Tilsamans / *I alt* | 181 | 212 |
| 3 | **Rentur og vinningsbýti** / ***Renter og udbytte m.v.*** | | |
| | Renta av lánsbrøvum / *Renter af værdipapirer* | 1.433 | 1.397 |
| | Renta av innlánum / *Renter af indlån* | 2.705 | 2.496 |
| | Tilsamans / *I alt* | 4.137 | 3.893 |
| 4 | **Virðisjavnan av íløguognum** / ***Kursreguleringer af investeringsaktiver*** | | |
| | Virðisjavnan av íløguognum / *Kursreguleringer af investeringsaktiver* | -44 | -169 |
| | Tilsamans / *I alt* | -44 | -169 |
| 5 | **Skattur** / ***Skat*** | | |
| | Skattur av skattskyldugari inntøku / *Skat af skattepligtig indkomst* | 439 | 904 |
| | Javnan av útsettum skatti viðvíkjandi ársúrslitinum / *Regulering af udskudt skat vedrørende årets resultat* | 2 | 9 |
| | Tilsamans / *I alt* | 441 | 913 |
| 6 | **Leiðslu- og starvsfólkaviðurskifti** / ***Ledelses- og medarbejderforhold*** | | |
| | Umroknað til fulla tíð hava í miðal starvast 16 fólk í felagnum í roknskaparárinum / *Omregnet til fuldtidsansatte har der i gennemsnit i regnskabsåret været ansat 16 personer.* | | |
| | Útreiðslurnar til lønir, eftirlønir o.a. kunnu sundurgreinast soleiðis / *Den samlede udgift til lønninger, pensioner m.v. udgør til:* | | |
| | Nevnd / *Bestyrelse* | 99 | 69 |
| | Stjórn / *Direktion* | 1.077 | 945 |
| | Fyri onnur starvsfólk er upphæddin / *For øvrige medarbejdere udgør beløbet:* | | |
| | Lønir / *Lønninger* | 6.620 | 4.951 |
| | Eftirlønir / *Pensioner* | 525 | 477 |
| | Sosialar útreiðslur / *Social sikring* | 482 | 374 |
| 7 | **Gjald til grannskoðarar** / ***Revisionshonorar*** | | |
| | Gjald til lógásetta grannskoðan / *Honorar for lovpligtig revision* | 160 | 161 |
| | Aðrar veitingar / *Andre ydelser* | 0 | 0 |

Viðmerkingar til ársroknskapin / Noter til årsregnskabet

| | DKK 1.000 | 2005 | 2004 |
|---|---|---|---|
| 8 | **Fastar ognir** / ***Faste ejendomme*** | | |
| | Útveganarvirði / *Anskaffelsespris* | 1.960 | 1.960 |
| | Tilgongd / *Tilgang* | 0 | 0 |
| | Frágongd / *Afgang* | 980 | 0 |
| | Avskriving undanfarin ár / *Tidligere års afskrivning* | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum /*Årets afskrivning* | 0 | 0 |
| | Bókað virði 31.12 / *Bogført værdi 31.12* | 980 | 1.960 |
| 9 | **Edv, innbúgv og bilar o.a.** / ***Edb, inventar og biler m.v.*** | | |
| | Útveganarvirði / *Anskaffelsespris* | 1.370 | 959 |
| | Tilgongd / *Tilgang* | 201 | 421 |
| | Frágongd / *Afgang* | 0 | 10 |
| | | 1.571 | 1.370 |
| | Avskriving undanfarin ár / *Tidligere års afskrivning* | 1.037 | 825 |
| | Avskrivingar í árinum / *Årets afskrivning* | 181 | 212 |
| | | 1.218 | 1.037 |
| | Bókað virði 31.12 / *Bogført værdi 31.12* | 353 | 333 |
| | Harumframt er avskrivað beinleiðis í rakstri / *Årets straksafskrivninger* | 1.451 | 1.379 |
| 10 | **Lánsbrøv** / ***Obligationer*** | | |
| | Kursvirði við ársbyrjan / *Kursværdi primo* | 37.353 | 32.807 |
| | Kursvirði við árs enda / *Kursværdi ultimo* | 36.478 | 37.353 |
| 11 | **Áogn hjá tryggingartakarum** / ***Tilgodehavender hos forsikringstagere*** | | |
| | Eftirstøður / *Præmierestancer* | 1.845 | 1.149 |
| | Frammanundan uppkravt / *Forudfaktoreret* | 7.627 | 6.753 |
| | Tilsamans / *I alt* | 9.472 | 7.902 |
| 12 | **Áogn hjá tryggingarfeløgum** / ***Tilgodehavender hos forsikringsselskaber*** | | |
| | Endurtryggingarpartur av skaðagjøldum / *Genforsikringens andel af udbetalte erstatninger* | 63 | 0 |
| | Tilsamans / *I alt* | 63 | 0 |
| 13 | **Onnur áogn** / ***andre tilgodehavender*** | | |
| | Postverk Føroya / *Postverk Føroya* | 7 | 8 |
| | Skattaogn (støðisogn) / *Skatteaktiver (anlægsaktiver)* | 42 | 43 |
| | Tilsamans / *I alt* | 49 | 51 |

14 **Eginpeningur / *Egenkapital***

| | *Partapeningur / Aktiekapital* | *Yvirkursgrunnur/ Overk.fond* | *Fluttur vinningur / Overført resultat* |
|---|---|---|---|
| Ársbyrjan 2005 / *Primo 2005* | 40.000 | | |
| Yvirkursgrunnur 2005 / *Overkursfond 2005* | | 44.975 | |
| Tiltaksgrunnur / *Reservefonde* | | | 25.000 |
| Ársúrslit / *Årets resultat* | | | 1.720 |
| Fluttur vinningur /*Overførte resultater* | | | 10.024 |
| Árslok 2005 / *Ultimo 2005* | 40.000 | 44.975 | 36.744 |

Eginpeningurin er grundkapitalurin í felagnum.
Solvensmarginin, ið er lógarinnar minstakrav til grundkapitalin, er við árs enda tkr. 8.786
Grundkapitalurin er 1.385 % av solvensmargin /
*Egenkapitalen er selskabets basiskapital.*
*Selskabets solvensmargin, der er lovgivningens minimumskrav til basiskapitalen, udgør ved regnskabsårets afslutning tkr. 8.786*
*Basiskapitalen udgør 1.385 % af solvensmargin.*

15 **Avsett til tryggingarvirksemi f.e.r. / *Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r.***
Tryggingar felagsins, tó tryggingar hjá størri skipum undantikið, hava leypandi høvuðsforfall, sum inniber, at tær einstøku tryggingarnar hvør einsæris hava gjaldingardag tann 1. í mánaðinum. Tryggingargjaldið verður antin goldið kvartárliga, hálvárliga ella árliga. Tryggingarnar hjá størri skipum hava allar høvuðsforfall tann 1. januar, og tryggingargjaldið fyri hesar verður goldið kvartárliga. Inntøkan er samsvarandi tíðaravmarkað./
*Selskabets forsikringer, bortset fra forsikringer for større skibe, har løbende hovedforfald, hvilket indebærer, at de enkelte forsikringer vil have betalingsdato individuelt den 1. i en måned. Præmien betales enten kvartalsvis, halvårsvis eller helårligt. Selskabets forsikringsportefølje for større skibe har hovedforfald til 1. januar, og præmien for disse forsikringer betales kvartalsvis. Præmieindtægten er periodiseret tilsvarende.*

| | | **2005** | **2004** |
|---|---|---|---|
| 16 | Skuld í samband við endurtrygging / *Gæld i forbindelse med genforsikring* | | |
| | Upphæddin er millumrokning við endurtryggingarfeløg / *Beløbet udgør mellemværender med genforsikringsselskaber.* | 2.267 | 879 |

17 Tíðaravmarkingar / *Periodeafgrænsningsposter*
Í upphæddini eru goldin ikki fallin tryggingargjøld / *Beløbet omfatter betalte endnu ikke forfaldne præmier*



Ársroknskapurin verður lagdur fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning /
*Årsregnskabet indstilles til generalforsamlingens godkendelse.*

Tórshavn, tann 21. februar 2006 / *Tórshavn, den 21. februar 2006*

**Stjórnin / *Direktionen***

Ali Celebi

**Nevndin / *Bestyrelsen***

Janus Petersen
Formaður / *Formand*

Christian Andreasen    Niels Juul Andersen    Tummas Hanus Dam

Hesin roknskapur er soleiðis samtyktur á ársaðalfundi í P/F TRYGD tann 21. februar 2006
*Dette regnskab er således godkendt på generalforsamlingen i P/F TRYGD den 21. februar 2006*

Fundarstjóri / *Dirigent*
Christian Andreasen

Ársroknskapurin fyri 2005 fyri P/F TRYGD er grannskoðaður av innanhýsis grannskoðanini í P/F FØROYA BANKA.
*Årsregnskabet for 2005 for* P/F TRYGD *er revideret af den interne revision i* P/F FØROYA BANKA.

Tórshavn, tann 21. februar 2006 / *Tórshavn, den 21. februar 2006*

Petur A. Johannesen
Grannskoðanarleiðari / *Revisionschef*

Vit hava grannskoðað tann av leiðsluni gjørda ársroknskap fyri 2005 fyri P/F TRYGD.

**Framda grannskoðanin**
Vit hava fyrireikað og framt grannskoðanina í samsvari við vanliga góðkendar grannskoðanarreglur við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin ikki inniheldur týðandi feilir ella manglar. Út frá eini meting um týdning og vanda hava vit undir grannskoðanini eftirkannað grundarlagið og skjalaprógvið undir teimum í ársroknskapinum uppsettu upphæddum og upplýsingum annars. Í hesi hava vit tikið støðu til nýttu roknskaparreglurnar og roknskaparligu metingarnar og hava mett, um upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi. Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Okkara fatan er, at ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við krøvini í lóggávuni um roknskaparframløgu, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ogn, eginpeningi, burturleggingum og skuld felagsins, tí fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

Vi har revideret det af ledelsen aflagde årsregnskab for 2005 for P/F TRYGD.

**Den udførte revision**
Vi har tilrettelagt og udført revisionen i overensstemmelse med almindeligt anerkendte revisionsprincipper med henblik på at opnå en begrundet overbevisning om, at årsregnskabet er uden væsentlige fejl eller mangler. Under revisionen har vi ud fra en vurdering af væsentlighed og risiko efterprøvet grundlaget og dokumentationen for de i årsregnskabet anførte beløb og øvrige oplysninger. Vi har herunder taget stilling til den anvendte regnskabspraksis og de regnskabsmæssige skøn samt vurderet, om årsregnskabets informationer som helhed er fyldestgørende. Revisionen har ikke givet anledning til forbehold.

**Konklusion**
Det er vor opfattelse, at årsregnskabet er aflagt i overensstemmelse med lovgivningens krav til regnskabsaflæggelsen, og at det giver et retvisende billede af selskabets aktiver og passiver, økonomiske stilling samt resultat.

Tórshavn, tann 21. februar 2006 / *Tórshavn, den 21. februar 2006*

**SPEKT**
Statsaut. Revisorar Sp/f /
*Statsaut. Revisorer Sp/f*

**Rasmussen & Weihe, P/F**
Statsautoriserað grannskoðarafelag

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor/
*statsautoriseret revisor*

Jákupa Mikkelsen
cand. merc. aud.

Klaus Rasmussen
statsaut. revisor/
*statsautoriseret revisor*

Ole Guldborg Nielsen
cand. merc. aud.

TRYGD

UPPSETING OG PRENT
FØROYAPRENT . TEL 314 555

TRYGD

ÁRSROKNSKAPUR
ÅRSREGNSKAB

2005

TRYGD